## Sjúkrakassaflytingar steðga av sær sjálvum

1. januar verður sjúkrakassarnir burtur, og tí skulu ikki fleiri flytingar gerast har. Bankarnir steðga sjálvir føstu flytingarnar. - Í sambandi við, at sjúkrakassagjaldið 1. januar 2010 verður umlagt til sjúkratrygging umvegis skattin, verður gjørt vart við, at neyðugt er ikki hjá viðskiftafólki at biðja bankan steðga flyting við sjúkrakassagjaldi. Hetta hendir av sær sjálvum. Hetta skrivar Føroya Banki á heimasíðu síni, og hinir bankarnar siga somuleiðis, at flytingarnar steðga av sær sjálvum. Síðan tað í gjár komu frá heilsumálaráðnum, sum mælti fólki til at strika sjálvvirkandi flytingar til sjúkrakassarnar, hevur telefonstormur verið í bankunum, og nú boða teir altso frá, at flytingarnar verða steðgaðar av sær sjálvum.

## Grunnur ella trygging

Aksel V. Johannesen vil hava at ognin hjá sjúkrakassanum, sum er einar 40 milliónir, skulu fylgja við yvir í nýggju Heilsutrygdina. Men peningurin skal ikki brúkast til rakstur, men markast til heilt ávís endamál, sum koma øllum til góðar. Tí vil habb brúka peningin til at stovna ein heilsugrunn, sum kann útbúgva kommunulæknar og serlæknar og sum kann styrkja og framtíðartryggja kommunulæknaskipanina. Grunnurin kann eisini stuðla heilsugransking og annað, sum kemur øllum til góðar og ikki bara einum fátali. Hansara sjónarmið er, at varðveitir sjúkrakassin peningin til eina privata trygging, verða tað nøkur fá, sum fara við øllum ognunum hjá øllum føroyingum, tí hann er sannførdur um, at tað verða bara tey vælbjargaðu, sum fara at tekna eina sjálvbodna trygging afturat almennu heilsutrygdini. Sjúkrakassin kallar hetta ognartøku, sum tey fara at seta seg ímóti og tey vilja seta eina privata trygging á stovn, sum skal hjálpa fólki, har almenna heilsutrygdin ikki røkkur

# Landsstýrismaðurin setti hart ímóti hørðum

**Aksel V. Johannesen vildi ikki finna seg í revolvarapolitikki frá sjúkrakassanum og tí hevur hann slept ætlanini at lata sjúkrakassan umsita nýggju heilsutrygdina í eini skiftistíð**

HEILSUTRYGDIN

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Tað hevur verið kaldligt ímillum Aksel V. Johannesen, landsstýrismann í heilsumálum, og føroysku sjúkrakassarnir seinastu mánaðirnar.

Men hesar seinastu dagarnar er tað blivið rættiliga ísakalt.

Tað eru 40 milliónir krónur, sum eru orsøkin til kuldabrúnna ímillum sjúkrakassarnar og landsstýrismannin.

Á midnátt í annaðkvøld halda gomlu sjúkrakassarnir uppat, tí tá verða allir limirnir í sjúkrakassanum fluttur yvir í almennu heilsutrygdina, sum fer at virka nýggjársdag.

Men sjúkrakassarnir eiga einar 40 milliónir krónur á bók og tað er hesa upphæddina, sum stríðið stendur um.

Landsstýrismaðurin í heilsumálum vil hava, at peningurin verður settur í ein almennan heilsugrunn, sum skal fíggja gransking og onnur almannagagnlig heilsumál.

Sjúkrakassarnir hinvegin vilja halda fram sum ein privat sjúkratrygging og vilja varðveita tær 40 milliónirnar sum stovnsfæ í eini slíkari trygging. Hetta skal vera ein sjálvboðin trygging við fyrimynd í Sygesikringen Danmark, sum skal vera sjálvboðin og sum føroyingar kunnu tekna seg í sum eitt ískoyti til almennu heilsutrygdina.

### Samráðingarnar steðgaðar

Seinastu mánaðirnar hava samráðingar verið ímillum landsstýrismanninogsjúkrakassarnar um ognirnar hjá sjúkrakassanum.

Men nú noyðist Aksel V. Johannesen at staðfesta, at samráðingarnar bóru ikki frukt og at steðgur er komin í.

Hann leggur afturat, at nú eru ongar samráðingar longur.

Tí ætlar hann at leggja uppskot fyri Løgtingið í vár um at stovna áðurnevnda heilsugrunn við teimum 40 milliónunum, sum sjúkrakassarnir eiga.

Hann leggur kortini afturat, at tað skal sjálvandi viðgerast í politisku skipanini fyrst.

Men so er vandi fyri, at landsstýrismaðurin verður drigin í rættin, tí sjúkrakassarnir hava fyrr boðað frá, at fer landskassin við pengunum í ein heilsugrunn, er talan um ognartøku og at tey eru til reiðar at fara í rættin við málinum.

### Fann seg ikki í revolvarapolitikki

Aksel V. Johannesen sigur, at ætlanin hevur verið, at í eini skiftistíð skuldi tað vera sjúkrakassarnir, sum skulduumsitanýggjuheilsutrygdina til nýggi stovnurin hevði funnið fótafestið.

- Tað hevur verið semja ímillum báðar partar um tað, sigur landsstýrismaðurin.

- Men beint fyri jól boðaðu sjúkrakassarnir mær frá, at teir vildu ikki átaka sær at umsita nýggju heilsutrygdina frá 1. januar, uttan so, at ein loysn fyrst verður funnin á ognunum upp á tær 40 milliónirnar.

Og tað skuldi vera ein loysn, har sjúkrakassin fekk helvtina av ognunum til eina privata sjúkratrygging.

Men hetta uppfataði landsstýrismaðurin sum revolvarapolitikk, sum hann ikki vildi finna seg í.

- Eg finni meg ikki í hóttanum at hesum slagi og tí boðaði eg sjúkrakassanum frá, at tað kemur ikki upp á tal og at teir sostatt heldur ikki skulu umsita heilsutrygdina frá 1. januar.

Tískil landsstýrismaðurin nú fyri at finna eina aðra loysn.

- Seinastu dagarnar hava samráðingar verið við aðrar partar um at umsita heilsutrygdina, sigur Aksel V. Johannesen.

Hann vil ikki siga, hvønn samráðst verður við, men hann vissar um, at ein forsvarlig loysn verður funnin fyri 1. januar, so at heilsutrygdin er í góðum hondum frá fyrsta degi.



*Tað eydnaðist ikki at finna semju um tær 40 milliónir krónurnar, sum sjúkrakassin eigur, tí báðir partar halda upp á sítt. Avleiðingin er, at landsstýrismaðurin hevur slept ætlanini um at sjúkrakassin skal umsita nýggju heilsutrygdina í eini skiftistíð*

# Sakarmál er síðsti útvegur

**- At stevna landsstýrinum verður avgjørt seinasti útvegur og tað fara vit at taka støðu til í næstum, sigur Jórun Gaardbo, forkvinna í meginfelag føroyska sjúkrakassa**

HEILSUTRYGDIN

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Sjúkrakassin ásannar, at samráðingarnar við landsstýrið hava verið úrslitaleysar, men tey vilja ikki siga, at tær eru slitnaðar*

- Báðir partar hava hildið upp á sítt og tí eru vit ongan veg komin.

Jórun Gaardbo er forkvinna í meginfelag føroyska sjúkrakassa og hon ásannar, at samráðingarnar við landsstýrismannin í heilsumálum um ognirnar hjá sjúkrakassanum standa í stað.

Talan er um 40 milliónir og landsstýrismaðurin vil framvegis seta pengarnar í ein almennan heilsugrunn. Hinvegin vil sjúkrakassin varðveita peningin til eina privata sjúkratrygging.

Men hóast samráðingarnar standa í stað, vil forkvinnan í meginfelagnum ikki staðfesta, at tær eru slitnaðar, tí hon sigur, at tey fara framvegis at royna at finna eina semju.

Seinasta útspælið frá sjúkrakassanum er, at sjúkrakassin fær 50% av ognunum, ella einar 20 milliónir krónur, til eina privata sjúkratrygging.

Tó ásannar hon, at so at siga ongi útlit eru fyri, at ein loysn verður funnin fyri nýggjár, tá ið almenna heilsutrygdin fer at virka.

Kortini vil hon ikki viðurkenna, at tað var í síðstu løtu, at sjúkrakassarnir gjørdu vart við, at tey vildu hava eina loysn á málinum um ognirnar hjá sjúkrakassanum fyri 1. januar.

- Tað hava vit alla tíðina ført fram, sigur Jórun Gaardbo.

Sjúkrakassarnir hava fyrr ført fram, at eydnast ikki at finna semju við tí úrsliti, at landskassin fer við pengunum, er talan um ognartøku og so verður Aksel V. Johannesen drigin í rættin.

Men í morgun var hon ikki heilt so avgjørd.

- Eitt sakarmál er avgjørt ikki tað, vit vilja og tað verður tann allarsíðsti útvegurin.

Hon sigur, at í næstum fer sjúkrakassin at taka støðu til, hvussu farast skal víðari fram í málinum.

### Óvist við starvsfólkunum

Sum tað sæst á hinari greinini her á síðuni, hevur Aksel V. Johannesen gjørt av at sleppa upprunaligu ætlanini um at lata sjúkrakassarnir umsita heilsutrygdina í eini skiftistíð.

Tí er tað ein spurningur, hvat verður av starvsfólkunum hjá sjúkrakassanum.

Eini 15 fólk arbeiða hjá sjúkrakassanum kring landið, men tey allarflestu eru tímalønt og hava bara nakrar fáar tímar.

Men í Havn, í Runavík og í Klaksvík eru fulltíðar starvsfólk.

Jórun Gaardbo veit ikki, hvussu verður við hesum fólkum, men tey verða í øllum førum ikki søgd upp beint nú, tí tey hava til 1. apríl at rudda borðini.